

**HANDARBEIÐI**

*- Mær dámar væl at brodera og binda. Men sum støðan er nú, fái eg bert bundið, tí eg fái ikki rættiliga brúkt mína vinstru hond, sigur 55 ára gamla Vera Müller*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

at mamman kundi vera við. Eftir konfirmasjónina fór Vera so niður til aftur til KURHUS, her nógvir føroyingar hava fingið viðger við góðum úrsliti.

Tað var kortini eitt ið undraði Emil: Hvørja ferð hann fór heim, aftan á at hava vitjað hana, steðgaði framgongdin.

- So tú kanst ætla, at eg var harmur um, at eg ikki var niðri meðan hon var í viðgerð har. Men man hevði arbeiði heima at røkja, eitt hús at betala og sonin sum gekk í skúla. Eg var tí noyddur at vera heima.

- Men tú skilir, at tað var ikki lætt at ganga heima í Føroyum, tá konan var til uppvenjing í Danmark, sigur hann álvarsamur.

Vera var á hesum stovninum fram til hálvan apríl árið eftir, og varð hon tá útskrivað. Tey mettu hana vera so fræga, at hon skuldi kunna klára seg heima og gera nøkur av teimum gerandisligu tingunum í einum heimi. Og soleiðis hevur tað gingið tey seinastu fýra árini.

Vera er tveir dagar um vikuna á verkstaðnum inni á Bakka í Vági. Henni dámar væl at binda og brodera, men fær bert bundið, tí hon ikki fær brúkt vinstru hondina.

- Vit hava roynt at halda stásið viðlíka, og at tað sær út til at vera framgongd í smáum við at ganga, endar maður hennara, Emil Mikkelsen frásøgn sína.

*snorri@sosialurin.fo*

# EITT stað

- Tað rættasta hevði verið at havt eitt stað til intensiva venjing, við fólki sum arbeiða sum eitt hold av sjúkrarøktarum, fysioterapeutum og ergoterapeutum, vísir Emil Mikkelsen á.

Sum avvarðandi dugir hann at sígga týdningin av eini góðari og støðugari venjing fyri fólk, sum eru í somu støðu sum kona hansara.

- Tað er fínt at hava hesi tilboðini gerandisdagar, men tað vísir seg ofta, at tað mestsum steðgar upp leygardag og sunnudag. Best hevði verið at fólk kundu komið til uppvenjingar eisini um vikuskiftini.

- Nú ið alt skal parast, kundu tey brúkt eitt av teimum smáu sjúkrahúsunum til eitt slíkt endamál, vísir Emil á.